# Akfarstrygd
# tryggingartreytir

TRYGD

**Motorsúkklur**
**Knallertir**
**Ellisakfør**
**ATV**

nr. MO-02-02
Desembur 2015

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit

**Tryggingartreytir fyri motorsúkklur, knallertir, ellisakfør og ATV**


| A. | Alment | Síða |
|---|---|---|
| 1. | Stovnan av tryggingini | 4 |
| 2. | Hvønn fevnir tryggingin um? | 4 |
| 3. | Hvar tekur tryggingin við? | 4 |
| 4. | Tryggingarskeið, uppsøgn og broyting | 4 |
| 5. | Rindan av tryggingargjaldi | 4 |
| 6. | Prístalsjavnan | 5 |
| 7. | Flyting, navna- og váðabroyting | 5 |
| 8. | Søla og frámelding | 5 |
| 9. | Sjálvsábyrgd | 5 |
| 10. | Iðranarrættur | 5 |

| B. | Reglur um ábyrgdartrygging | Síða |
|---|---|---|
| 11 | Hvat fevnir ábyrgdartryggingin um? | 6 |
| 12 | Hvat fevnir ábyrgdartryggingin ikki um? | 6 |
| 13 | Regress (aftursóknarkrav) vegna ábyrgdarskaða | 6 |

| C. | Reglur um skrokk-/brunatrygging | Síða |
|---|---|---|
| 14 | Hvat fevnir skrokk-/brunatryggingin um? | 7 |
| 15 | Hvat fevnir skrokk-/brunatryggingin ikki um? | 7 |
| 16 | Bjargingartrygging uttanlands (SOS-skipanin) | 7 |
| 17 | Rættarhjálpartrygging | 7 |

| D. | Aðrar reglur fyri tryggingini | Síða |
|---|---|---|
| 18 | Náttúruvanlukkur, kríggj og kjarnorka v.m | 8 |
| 19 | Royndarkoyring | 8 |
| 20 | Kærustovnar | 8 |

| E. | Tá skaði hendir | Síða |
|---|---|---|
| 21 | Skaðafráboðan | 9 |
| 22 | Hvussu verður skaðin endurgoldin | 9 |
| 23 | Meirvirðisgjald | 9 |
| 24 | Dupulttrygging | 9 |

# A. Alment

Umframt hesar treytir er galdandi lóggáva á økinum og møguligar sertreytir á tryggingarskjalinum galdandi.

## 1. Stovnan av tryggingini

1.1 Tryggingin tekur við í teirri løtu, felagið góðkennir áheitan um trygging ella frá teirri løtu semja er um tryggingaravtaluna.

1.1.1 Tekur tryggingin við í staðin fyri trygging í øðrum tryggingarfelag, tekur tryggingin við frá teirri løtu, tryggingin í hinum tryggingarfelagnum heldur uppat.

## 2. Hvønn fevnir tryggingin um?

2.1 Tryggingartakarin og ein og hvør, sum við loyvi frá tryggingartakaranum brúkar akfarið sum førari ella sum ferðafólk, eru fevnd av tryggingini.

2.2 Verkstøð, umvælarar, sølufólk og onnur, sum hava akfarið til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella í varðveitslu annars, eru einans fevnd av tryggingini, tá talan er um koyriskaðar, um koyringin kann sigast at røkja áhugamál tryggingartakarans.

2.3 Nýggjur eigari er fevndur av tryggingini í 3 vikur aftan á eigaraskifti, tó í mesta lagi til nýggj akfarstrygging er teknað.

## 3. Hvar tekur tryggingin við?

3.1 Ábyrgdartryggingin tekur við í Føroyum og í teimum londum, sum hava tikið undir við grøntkortskipanini samsvarandi galdandi lóg um bilar í viðkomandi londum.

3.1.1 Grøna kortið er skjalprógv yvir fyri útlendsku toll- og løgreglumyndugleikunum á staðnum um, at ábyrgdar-trygging, ið er galdandi í viðkomandi landi, er teknað fyri akfarið.

3.1.2 Tá koyrt verður í londum, sum ikki hava tikið undir við grøntkort-skipanini, skal serstøk ábyrgdartrygging teknast við markið.

3.2 Skrokktryggingin tekur við í Føroyum og í teimum londum, sum hava tikið undir við grøntkort-skipanini.

3.3 Felagið kann við 14 daga varningi broyta rættin til tryggingarendurgjald fyri skaðar, ið henda uttanlands, uttan at hetta fær ávirkan fyri hinar partarnar av tryggingaravtaluni.

3.4 Nærri upplýsingar um, hvørji lond eru fevnd av grøntkort-skipanini, og um hvar grønt kort skal havast við, kunnu fáast frá Trygd.

3.5 Felagið kann krevja avgreiðslugjald fyri at skriva út grøntkort og SOS-kort.

3.6 Serligar treytir fyri tryggingina standa á tryggingarskjalinum.

## 4. Tryggingarskeið, uppsøgn og broyting

4.1 Tryggingin er galdandi til hon skrivliga verður søgd upp av tryggingartakaranum ella felagnum við í minsta lagi 1 mánaða varningi, til tann fyrsta í mánaðinum

4.2 Aftan á hvønn skaða hava bæði tryggingartakarin og felagið rætt til, í upp til 1 mánað eftir, at skaðin er gjørdur upp, at siga upp tryggingina við 14 daga varningi

4.3 Harafturat kann felagið í upp til 1 mánað eftir, at skaðin er gjørdur upp, sum treyt fyri framhaldandi trygging, herða tryggingartreytirnar, sum t.d. hækka sjálvs-ábyrgdina ella umskipa gjaldið í serstaka gjaldsskrá í eitt ávíst tíðarskeið.

4.4 Tryggingin kann harafturat sigast upp av felagnum við 14 daga varningi, um so er, at serstakt gjald, sambært grein 4.3, sjálvsábyrgd sambært grein 9.0 ella útgoldið meirvirðisgjald sambært grein 23.0 ikki verður goldið sambært kravi.

## 5. Rindan av tryggingargjaldi

5.1 Fyrsta tryggingargjaldið og uppkravsgjald fella til gjaldingar samstundis sum tryggingin kemur í gildi, og seinni tryggingargjøld og uppkravsgjøld teir gjalddagar, sum ásettir eru í tryggingarskjalinum.

5.2 Gjaldskrøv verða send á ta adressu, ið tryggingartakarin hevur tilskilað.

5.3 Verður tryggingargjaldið ikki goldið aftaná fyrsta krav, sendir Trygd nýggja skrivliga gjaldsáminning til ta adressu, tryggingartakarin hevur tilskilað, og tryggingar-takarin verður skuldskrivaður fyri áminningargjald.

5.4 Í áminningarskrivinum verður tilskilað, hvør rættarfylgjan er, verður tryggingargjaldið ikki goldið innan ta í skrivinum ásettu freistini.

5.5 Tílík áminning verður ikki send, fyrrenn 14 dagar eru farnir, síðani gjaldsfreistin fyri fyrsta uppkrav er farin. Verður ikki goldið innan 14 dagar eftir áminningina, eru felagsins skyldur falnar burtur.

5.6 Møguligur veðhavari og løgregla fáa fáboðan, til tess at nummarspjøldur kunnu verða tikin.

5.7 Er tryggingin farin úr gildi, av tí at tryggingargjaldið ikki er goldið, kann hon ikki setast í gildi aftur, fyrr enn eftirstøðan og tryggingargjald fram til høvuðsforfall er goldið, og tá einans treytað av, at tryggingargjaldið verður goldið heilárliga umvegis Gjaldsskipanina tey næstu 2 árini.

## 6. Prístalsjavnan

6.1 Tryggingargjaldið verður prísjavnað sambært teim kunngjørdu nýtiligu vísitølunum frá Hagstovu Føroya.

6.2 Verða ongi nýtilig almenn vísitøl kunngjørd, hevur Trygd rætt til at prísjavna við øðrum grundarlagi. Grundarlagið er vísitølini fyri januar ársfjórðing, kalendarárið fyri, at tryggingin verður stovnað.

## 7. Flyting, navna- og váðabroyting

7.1 Skjótast tilber skal skrivlig fráboðan sendast felagnum:

7.1.1 Tá tryggingartakarin ella tann fasti brúkarin skifta bústað ella navn.

7.1.2 Tá váðin, sum nevndur er í tryggingarskjalinum, verður broyttur, eitt nú við at nýtslan av akfarinum verður broytt, hevur tryggingartakarin skyldu at boða Trygd frá, soleiðis at støða kann verða tikin um og undir hvørjum treytum tryggingin kann halda áfram.

7.2 Váðabroyting kann hava við sær broyting í tryggingargjaldinum, roknað frá tí at váðin er øktur, ella uppsøgn av tryggingini.

7.3 Verður váðabroyting ikki fráboðað, kann hetta hava við sær, at rætturin til endurgjald heilt ella fyri ein part fellur burtur.

## 8. Søla og frámelding

8.1 Verður tryggjaða akfarið avhendað, fellur tryggingin beinanvegin burtur. Tryggingartakarin skal beinanvegin geva felagnum boð um avhendingina.

8.2 Tryggingin kann ikki flytast nýggja eigaranum.

8.3 Tryggingargjald, sum goldið er fyri tíðina, eftir at tryggingin er farin úr gildi, verður afturgoldið.

8.4 Tryggingaravtalan kann ikki flytast ella latast triðja manni. Óavgreiddir skaðar kunnu bert flytast ella latast triðja manni við góðkenning frá felagnum.

## 9. Sjálvsábyrgd

9.1 Sjálvsábyrgdin er bert galdandi fyri skrokktryggingina, og er ásett í tryggingarskjalinum.

(upphæddirnar verða ikki prístalsjavnaðar)

## 10. Iðranarrættur

(bert galdandi fyri privatar tryggingar)

10.1 Tú kanst angra keypið av hesi trygging.

10.2 Angringarfreistin er 14 dagar. Freistin gongur frá tí degi, tú hevur fingið fráboðan um, at tryggingin er teknað. Freistin er tó í fyrsta lagi galdandi frá tí degi, tú á skrift hevur fingið upplýsing um angringarrættin.

10.3 Gongur freistin út ein halgidag, leygardag, sunnudag, grundlógardag, jólaaftan ella nýggjársdag, verður freistin longd til næsta gerandisdag

10.4 Um tú ynskir at angra keypið av tryggingin, skalt tú boða Trygd skrivliga frá hesum, áðrenn freistin gongur út.

# B. Reglur um Ábyrgdartrygd

## 11. Hvat fevnir ábyrgdartryggingin um?

11.1 Ábyrgdartryggingin fevnir um endurgjaldsábyrgd sambært ásetingum ferðslulógarinnar um skaða, sum er elvdur av akfari, sí § 54 í Ferðslulógini. Tá koyrt verður aðrastaðni enn í Føroyum - sí stykki 3.1 – svarar tryggingin fyri endurgjaldsábyrgd sambært teimum lógum og endurgjaldsupphæddum, sum galdandi eru í viðkomandi landi.

11.2 Felagnum er heimilað at gera semju um spurningin um endurgjald. Tryggingartakarin hevur skyldu til at geva felagnum fulltrú til sína vegna at føra møgulig rættarmál og samráðingar.

11.3 Umframt sjálvt endurgjaldið rindar tryggingin eisini álagdan málskostnað og rentu av endurgjaldinum.

## 12. Hvat fevnir ábyrgdartryggingini ikki um?

12.1 Ábyrgdartryggingin svarar ikki fyri persónskaða á føraran.

12.2 Harafturat svarar tryggingin ikki fyri skaða á lutir ella aðra ogn, sum eru ogn hjá førara, føstum brúkara, tryggingartakara, hjúnafelaga/sambúgva hansara/hennara, ella virki, sum hesi eiga heilt ella fyri ein part.

12.3 Skaða á viðfest akfar ella útbúnað.

12.3.1 Skaða, sum hendir, tá akfarið er útleigað.

12.4 Skaða, sum hendir, tá akfarið er á verkstaði, hjá umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava akfarið til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella á annan hátt í varðveitslu.

## 13. Regress (aftursóknarkrav) vegna ábyrgdarskaðar

13.1 Felagið hevur rætt til regress móti førara av tryggjaðum akfari, um so er, at hesin hevur elvt skaðan við vilja sambært ásetingunum í Ferðslulógini § 55.

13.2 Er skaði elvdur við grovum ósketni, verður, við atliti til skuldarmunin og umstøðurnar annars, gjørt av, um felagið skal hava regress, og tá í hvønn mun.

13.3 Felagið hevur regress viðvíkjandi skaðum, sum hendir eru, meðan akfarið hevur verið leigað út uttan førara.

13.4 Felagið hevur regress móti viðkomandi, sum hevur ábyrgd fyri skaðanum, um so er, at felagið hevur havt skyldu til at rinda fyri ein skaða, sum tryggingin ikki fevnir um.

# C. Reglur um skrokk-/brunatrygging

Eru bert galdandi, um tað er nevnt í tryggingarskjalinum.

## 14. Hvat fevnir skrokk-/brunatryggingin um?

14.1 Skrokktryggingin svarar fyri ein og hvønn skaða og stuldur við teimum í stykkjunum 15.1 til 15.11 nevndu undantøkum.

14.2 Brunatryggingin svarar fyri skaða á akfarið, sum stendst av eldi, spreinging, skammlopi og av at snarljós slær niður við teimum í stykkjunum 15.1 til 15.11 nevndu undantøkum.

14.3 Útgerð, sum verksmiðja ikki hevur fest í akfarið, verður endurgoldin við upp til kr. 15.000, íroknað íseting, arbeiðsløn og mvg (støðisár 2015).

14.3.1 Grein 14.3 er bert galdandi fyri motorsúkklur, men **ikki** fyri knallertir, ellisakfør ella ATV.

14.4 Partar av akfarinum ella útgerð til akfarið, íroknað útgerðin nevnd í grein 14.3, er bert fevnt av tryggingini, um tað er fest í akfarið, tvs. at tað ikki kann takast burtur uttan so, at amboð verða nýtt.

14.4.1 Hetta er tó ikki galdandi fyri viðføristaskur til motorsúkklir

## 15. Hvat fevnir skrokk/brunatryggingini ikki um?

15.1 Tryggingin fevnir ikki um vanligt slit ella stormskaðar á lakk, ella skaðar á lakk vegna steinslag. Heldur ikki fevnir tryggingin um møguliga virðisminkan av akfarinum vegna aldur og nýtslu, herímillum slit, tering av rusti, lakkskaðar vegna steinslag og skøvur í rútum.

15.2 Skaðar, sum einans eru í og eru avmarkaður til mekanisku og elektrisku lutirnar (t.d. motor, gervisskipan, stýrislutir, og elektronisku stýri og eftiransingarskipan).

15.2.1 Tryggingin fevnir tó um hesar skaðar, um so er, at skaðin hevur staðist av eldi, stuldri, herverki ella av tí at snarljós slær niður.

15.3 Skaða ella stuldur, meðan akfarið er latið verkstaði, umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava akfarið til umvælingar, tænastueftirlits, sølu ella á annan hátt í varðveitslu.

15.3.1 Tryggingin fevnir tó um hesar skaðar, um so er, at skaðin er íkomin tá koyrt verður ella av eldi, sí grein 2.2.

15.4 Skaða, sum kemur á akfarið undir umvæling, ella tá arbeitt verður upp á tað, antin tað er á verkstaði ella privat.

15.5 Skaða, sum stendst av koyring við ov lítlum vatni ella olju, og skaða sum stendst av frostspreinging.

15.6 Skaða, sum hendir, tá akfarið er leigað út.

15.7 Miss og stuldur av brennievni.

15.8 Útreiðslur til útleiguakfar í staðin fyri tryggjaða akfarið og virðisminkan.

15.9 Skaða sum er elvdur við vilja, við grovum ósketni, ella tá førarin koyrir ávirkaður av rúsdrekka, heilivági ella narkotika, sí §§ 18 og 20 í tryggingaravtalulóguni.

15.10 Skaðar, sum henda, tá tann, sum koyrir akfarið, ikki hevur lógarásett koyrikort.

15.11 Skaða, sum stendst av, at akfarið hevur eitt ella fleiri niðurslitin dekk.

15.12 Tryggingartakarin er tó fevndur av tryggingini, tá talan er um skaðatilburðir, sum nevndir eru undir stykkjunum 15.9 til og við 15.11, um so er, at tryggingartakarin ikki koyrdi akfarið og ikki visti, ella átti at vita, at talan var um nevndu umstøður, treytað av, at tað ikki var av grovum ósketni, at hann ikki visti um hesi viðurskifti.

15.12.1 Tryggingin er tó í ongum førum galdandi, um akfarið undir teimum umstøðum, sum eru nevndar í grein 15.9 til og við 15.11 verður ført av:

1. Hjúnafelaga/sambúgva tryggingartakarans
2. Børnum tryggingartakarans, sum búgva heima
3. Tí sum sambært tryggingarskjalinum er fastur brúkari

15.13 Hevur felagið havt skyldu til at rinda endurgjald fyri ein skaða, sum ikki er fevndur av skrokk-/brunatryggingini, hevur felagið regress móti skaðavoldaranum, sum hevur ábyrgdina

## 16. Bjargingartrygging uttanlands (SOS-skipanin)

(bert galdandi fyri motorsúkklur og knallertir)

16.1 Tryggingin tekur bert við, um skrokktrygging er teknað (ikki einans ábyrgdar-og/ella brunatrygging).

16.2 Treytirnar fyri bjargingartryggingina uttanlads síggjast á reyða SOS-kortinum, ið er ein partur av tryggingaravtaluni.

16.3 Kortið kann útskrivast frá heimasíðuni hjá Trygd, **www.trygd.fo**, ella avheintast á skrivstovu okkara.

## 17. Rættarhjálpartrygging

17.1 Rættarhjálpartryggingin er tengd at skrokktryggingini fyri akfarið. Er einans teknað ábyrgdar- og/ella brunatrygging fyri akfarið, er ongin rættarhjálpartrygging.

17.2 Fulnaður verður veittur sambært tryggingartreytunum fyri rættarhjálpartrygging, sum *Dansk Forsikring og Pension* ásetur fyri øll tryggingarfeløg. Tryggingartreytirnar verða útflýggjaðar eftir áheitan. Eisini ber til at taka treytirnar niður av heimasíðu okkara, **www.trygd.fo.**

17.3 Alment kann sigast, at rættarhjálpartryggingin fevnir um ein part av útreiðslum tryggingartakarans í sambandi við ávísar ósemjur, ið tryggingartakarin sum eigari, brúkari ella førari av skrokktryggjaða akfarinum er partur í. Endurgjaldið kann í mesta lagi verða kr. 200.000, og sjálvsábyrgdin er 10% av útreiðslunum - tó í minsta lagi kr. 2.500.

17.4 Fyri at fáa rættarhjálp skal tryggingartakarin seta seg í samband við advokat. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at ein advokatur vil átaka sær málið.

# D. Aðrar reglur fyri tryggingina

## 18. Náttúruvanlukkur, kríggj og kjarnorka v.m.

18.1 Tryggingin fevnir ikki um skaðar, sum eru elvdir av kríggi, uppreistri ella borgaraligum ófriði umframt jarðskjálvta og øðrum órógvandi náttúrufyribrigdum.

18.2 Tryggingin tekur tó við, um tílíkir tilburðir henda í einum landi, sum er fevnt av punkti 3.1 og 3.2, har tryggjaði er á ferð uttan fyri Føroyar í upp til ein mánaða eftir, at nevndu umstøður hava tikið seg upp. Tað er tó ein treyt, at tryggingartakarin ikki koyrir inn í eitt land, sum er rakt av teimum tilburðum, sum nevndir eru í punkt 18.1.

18.3 Tryggingin tekur ikki við skaðum, sum eru elvdir av kjarnorku.

## 19. Royndarkoyring

19.1 Tryggingin fevnir um skaða, sum hendir undir royndarkoyring ella venjing til royndarkoyring, treytað av:

19.1.1 At koyrt verður í Føroyum.

19.1.2 At løgreglan hevur givið loyvi til einstøku koyringarnar, um loyvi krevst.

19.1.3 At ásettu koyrireglurnar verða fylgdar.

19.2 Tryggingin fevnir **ikki** um skaða, sum hendir undir lendis-, kapp- og rasarakoyring ella venjing til tílíka koyring, umframt alla koyring á breyt ella øki, sum er avbyrgt til endamálið.

## 20. Kærustovnar

20.1 Felagið er tengt at:
Ankenævnet for Forsikring, sum er stovnsett av Forbrugerrådet og Dansk Forsikring og Pension.

20.2 Er ósemja millum felagið og tryggingartakaran um tryggingina, og er ikki nøktandi úrslit komið burturúr, hóast tryggingartakarin av nýggjum hevur vent sær skrivliga til felagið, kann tryggingartakarin kæra til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2, 1. sal
1572 København V
Tlf. (+45) 33 15 89 00
kl. 10.00 - 13.00 (donsk tíð).
Heimasíða: www.ankeforsikring.dk

20.3 Eitt ávíst kærugjald skal gjaldast, tá kært verður. Kærugjaldið sæst á heimasíðuni hjá kærunevndini, www.ankeforsikring.dk. Gjaldið verður endurgoldið, um tú fært fult ella lutvíst viðlíkahald í kæruni.

20.4 Kærur til kærunevndina skulu skrivast á donskum á serligt kærublað, ið fæst á **www.trygd.fo** og **www.ankeforsikring.dk**.

20.5 Kæra til kærunevndina er ikki steðgandi, hvat viðvíkur møguligari rindan av sjálvsábyrgd og hækkaðum tryggingargjaldi.

# E. Tá skaði hendir

## 21. Skaðafráboðan

21.1 Hendir skaði, sum tryggingin fevnir um, skal tryggingartakarin beinanvegin senda felagnum skrivliga skaðafráboðan.

21.2 Skaðafráboðanin skal lýsa skaðatilburðin so gjølla sum tilber. Fráboðanin skal skrivast á skaðafráboðanarblað, sum fæst hjá felagnum ella á **www.trygd.fo**. Eisini ber til at ringja á skrivstovu felagsins 35 81 00.

**Skaðatænastan**
Eftir kl. 16 gerandisdagar, tó hósdag eftir kl. 17.00, vikuskiftis- ella halgidagar ber til at ringja til Skaðatænastuna á telefon 32 13 12.

21.3 Tryggingartakarin hevur skyldu til at royna at avmarka skaða. Ger tryggingartakari ikki tað, kann hetta fáa avleiðingar fyri møguligt skaðaendurgjald.

21.4 Ferðsluóhapp, stuldurs- og herverksskaðar skulu beinanvegin fráboðast løgregluni.

21.4.1 Verður hetta ikki gjørt, kann tað fáa avleiðingar fyri møguligt endurgjald.

21.5 Avtalur um umvæling ella endurgjaldskrav mugu ikki verða gjørdar uttan samtykki felagsins. Á sama hátt mugu skaddir lutir ikki verða burturbeindir uttan loyvi frá Trygd. Verður hetta gjørt, kann tað fáa avleiðingar fyri møguligt skaðaendurgjald.

21.6 Tá skaði verður fráboðaður, skal kravið skjalprógvast eftir besta førimuni. Hetta kann gerast við rokningum, kvittanum, sáttmálum, myndum o.l. Kann kravið ikki skjalprógvast, kann tað fáa avleiðingar fyri eitt møguligt endurgjald.

## 22. Hvussu verður skaðin endurgoldin

22.1 Felagið kann antin endurrinda skaðan kontant ella lata akfarið umvæla.

### 22.2 Umvæling

22.2.1 Endurgjald verður veitt upp til eina peningaupphædd, sum svarar til virðið á akfarinum, tá skaðin hendi – tað vil siga virðið á akfari av sama merki, aldri og standi. Endurgjaldið kann ongantíð fara upp um dagsvirðið.

22.2.2 Felagið hevur rætt til at gera av, hvar skaðin skal sýnast og umvælast.

22.2.3 Felagið kann ikki ábyrgdast fyri brek við arbeiðinum, sum verkstaðið hevur ábyrgdina av.

22.2.4 Farast kann ikki undir umvælingina, og umvælingin kann ikki fremjast uttan samtykki frá felagnum.

22.2.5 Hevur umvælingin við sær, at akfarið verður í betri standi enn frammanundan (t.d. vegna tering ella slit), skal tryggingartakarin sjálvur rinda tann partin av umvælingarútreiðslunum, sum svara til virðishækkanina.

22.2.6 Verður umvælingin gjørd uttan fyri vanliga arbeiðstíð, rindar felagið ikki tær eykaútreiðslur, sum hetta hevur við sær.

22.2.7 Felagið rindar einans fyri umvæling av skaddu lutunum. Sum dømi kann nevnast, at felagið ikki endurrindar fyri litbrigdi aftaná lakering, mun á felgum aftaná umvæling ella útskifting av eini ella fleiri felgum.

22.2.8 Tryggingin hevur ikki ábyrgdina av, at eykalutir, sama slag sum teir skaddu, ikki kunnu útvegast.

22.2.9 Lækkar handilsvirðið á akfarinum av umvælingini ella skaðanum, verður henda virðislækking ikki endurgoldin.

### 22.3 Flutningsútreiðslur

22.3.1 Felagið rindar neyðturviligar flutningsútreiðslur til næsta góðkenda verkstað í Føroyum treytað av, at talan er um skaða, sum er fevndur av tryggingini.

22.3.2 Verður akfarið stolið, rindar tryggingarfelagið neyðturviligar flutningsútreiðslur til heimstaðin.

### 22.4 Kontantendurgjald

22.4.1 Verður skaðin endurgoldin kontant, verður endurgjaldið ásett til ta upphædd, sum eitt akfar av sama merki, aldri og standi kundi fingist fyri móti gjaldi í hondina.

22.4.2 Tá talan er um stuldur, er tað ein treyt, at akfarið ikki verður funnið aftur innan 4 vikur eftir, at felagið og løgreglan hava fingið fráboðan um stuldurin. Tað er ein treyt, at fráboðanin til felagið er skrivlig.

22.4.3 Hevur felagið goldið endurgjaldið kontant, er akfarið ogn felagsins.

## 23. Meirvirðisgjald (mvg)

23.1 Fyri akfør, sum eru ogn hjá meirvirðisskrásettum tryggingartakarum, eru hesar treytir galdandi:

23.1.1 Kann tryggingartakarin rokna meirvirðisgjaldið upp í inngangandi gjaldið, rindar felagið meirvirðisgjaldið soleiðis, at tað verður flutt umvælaranum. Tryggingartakarin hevur síðani skyldu til at endurrinda felagnum meirvirðisgjaldið.

23.1.2 Tá endurgjaldið verður latið kontant, verður meirvirðisgjaldið drigið frá endurgjaldinum

## 24. Dupulttrygging

24.1 Er trygging fyri somu lutir og sama váða tryggjað í øðrum tryggingarfelagi, skal skaðin fráboðast bæði Trygd og viðkomandi felag. Samstundis skal Trygd hava fráboðan um dupulttryggingina.

24.2 Er fyrivarni tikið í tryggingarskjalinum hjá hinum tryggingarfelagnum um, at tryggingin fellur burtur ella lækkar, um trygging er teknað sambært øðrum tryggingarskjali, er sama fyrivarni galdandi í hesi tryggingini, og tryggingarfeløgini rinda tá, vísandi til Tryggingaravtalulógina grein 41-44, lutfalsligt endurgjald.

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Trygd hugsar um teg

SENDISTOVAN